

## Goymdu sigarettir umborð

Tá ein russiskur trolari úr Murmansk kom á Havnina fríggjadagin, funnu tollararnir 47.000 sigarettir, sum vóru goymdar burtur í skipinum. Talan var um amerikanskar sigarettir av merkinum LM. Sigarettirnar vóru ikki uppgivnar fyri tollvaldinum, og tað er brot á tollreglurnar, sum verður sektað við bót. Skipið fekk álagt eina bót uppá tilsamans kr. 178.000, sum skal gjaldast áðrenn trolarin sleppur at loysa aftur. Tolleftirlitið hjá TAKS ger regluliga skipaði eftirlit við skipum, sum koma til landið, og tað var í samband við eitt av hesum eftirlitum, at Tolleftirlitið kom fram á sigarettirnar.

## Íslendingar vilja eiga Gunnar

Íslendingar gera nú krav upp á føroyska landsliðsmálmannin Gunnar Nielsen – í øllum førum helvtina av honum. Morgunblaðið skrivar í røttum føroyskum anda, at málmaðurin hjá Manchester City er hálvur íslendingur. Mamma Gunnar Nielsen er úr Siglufirði í Íslandi. Spurningurin er, um danir nú koma í hølunum á íslendingum. Finn Nielsen, sum er pápi Gunnar er úr Klaksvík. Pápi Finn var Hans Nielsen, bedingsmeistari, sum var ættaður úr Vatnsoyrum, og mamma Finn var donsk.

## Stuldur úr hjallum

Tveir tilburðir um stuldur úr hjallum vórðu fráboðaðir til politiið fríggjadagin.

Fyrrapartin varnaðust fólk í Hvalvík, at onkur hevði verð inni í hjalli teirra og stolið tvey turr tjógv, tvær fløskur av víni og nakrar fløskur av rúsdrekka.

Um kvøldið tók politiið ein mann, sum hevði verið inni í einum hjalli á Toftum og tikið fýra tjógv.

*randi@sosialurin.fo*

## Sparkaður í høvdið

Tvey tey seinastu vikuskiftini vóru sera friðarlig í Havn, men tað hevndi seg aftur farna vikuskiftið.

Um hálvgum trý tíðina var ein ráur tilburður í Klubbagarðinum.

Ein 16 ára gamal drongur varð sparkaður í høvdið og uttan vit fluttur á Landsjúkrahúsið, har hann varð innlagdur.

Vitni hava greitt politinum frá, at drongurin varð sparkaður, meðan hann lá niðri.

Frá vitnum hevur politiið fingið at vita, hvussu maðurin sá út, og hvørjum klæðum hann var í. Í morgun var gerningsmaðurin enn ikki funnin.

*randi@sosialurin.fo*

# Ofta oljudálking

**DÁLKING** Umhvørvisstovan heitir inniliga á fólk um at boða frá, tá ið oljua rekur á sjógv

Randi Jacobsen

Seinastu tíðina hava fleiri tilburðir verið av oljudálking.

Leygardagin fyriníggju døgum síðan var ein stór oljudálking frá russiskum trolarum, sum lógu í Norðhavnini í Ánunum. Henda oljudlking, sum kostaði reiðarínum hjá skipunum 25.000 krónur í bóti og 5,5 mió. krónur í endurgjaldi, varð ikki fráboðað.

Mánadagin í seinastu viku var tað Blikur, sum misti tungolju á sjógv. Tað óhappið varð fráboðað.

Seinasta leygarkvøldið fór nakað av gassolju á sjógv frá trolaranum Haki í Norðhavnini. Hetta óhappið varð fráboðað, og eingin skaði hendi.



Higartil í ár eru fimm oljudálkingar fráboðaðar til MRCC, sum er myndugleikin, ið skal hava fráboðanum oljudálkingar á sjónum. MRCC skal eisini fráboðast tá vandi er fyri oljudálking. MRCC hevur telefon 351300.

**Hevur skund**

Umhvørvisstovan minnir á, hvussu umráðandi tað er at boða frá skjótast gjørligt, so oljan kann verða tikin upp aftur skjótt.

Í havumhvørvislógini er ásett, at oljudálkingar skulu fráboðast, og er tað tí revsivert ikki at boða frá. Verður tað ikki gjørt, gerast bæði umhvørvisligu og peningaligu avleiðingarnar av dálkingini størri . Jú meiri orka skal brúkst til at rudda upp, størri verður endurgjaldskravið ímóti dálkaranum. Týdningurin av at boða frá kann væl lýsast út frá teimum báðum oljudálkingunum í farnu viku, sigur Umhvørvisstovan.

*randi@sosialurin.fo*

# Ári er við Svalbard

Náttúrugripasavnið hevði næstan mist vónina um at frætta aftur frá roysninginum Ára, sum vitjaði í Føroyum.

Sendari varð settur á hann í Føroyum, og til bar at fylgja roysningin, tá ið hann úr Føroyum fór norður um Ísland, eitt sindur suðuraftur og so svam í ein beinan landnyrðing.

Tey boðini komu frá roysninginum 9. apríl, og so hoyrdist einki aftur frá honum.

Men fríggjadagin sendi hann aftur, og tá trígjar ferðir.

Tá var Ári næstan komin upp til Svalbard.

*randi@sosialurin.fo*



# Nevningating hjá Starvsmannafelagnum

**FØROYA RÆTTUR** Tvær vikur eru settar av í mai til nevngatingið móti tveimum litavum, sum eru skuldsetir fyri at hava smuglað sterk rúsevni inn til Føroya

Randi Jacobsen

Føroya rættur hevur leigað seg inn hjá Starvsmannafelagnum í Havn til at hava nevningating í mai.

Av tí at Dómhúsið er undir umbygging, verða rættarfundirnir vanliga hildin í øðrum hølum undir Glaðsheyggi, men tey hølini eru ov smá til eitt nevningating.

Teir skuldettur eru tveir litavar, sum hava sitið varðhaldsfongslaðir síðan november í fjør, og teir seru skuldsettur fyri at hava smuglað stórar nøgdir av sterkum rúsevnum til Føroya. Ætlanin hjá monnunum var at fara víðari til Íslands við rúsevnunum.

Rætturin hevur sett tvær vikur av til nevningatingið, sum verður fraá 17. til 28.

Eitt nevningating krevur ikki sørt av plássi, tí nevningarnir eru tólv umframt tveir aftrat, sum mugu fylgja málinum, um onkur av føstu nevningunum fær forfall.

Í rættarsalinum skal eisini vera rúm fyri báðum teimum skuldsettu, sakførarum teirra, ákæra og dómara. Nevningating eru almenn, og almenninginum skal somuleiðis rúm vera fyri.